## Nýggir filmar hesa vikuna

**Støð**
Filmsheiti, **Dagur/ar** ***(klokkutíð)***

**Svf**
- Titanic town – bretskur/írskur filmur - Um neyðina, tá tú býr mitt í norðurírska borgarakrígnum. - Óhóskandi fyri smábørn, **28.** ***(22.15)***
- American Psycho – kan./am. ræðufilmur - Um unga Patrick Bateman, sum skiftir ham, tá náttin kemur. - Óhóskandi fyri børn, **28.** ***(23.55)***
- Løgreglumaður í barnagarðinum – am. skemtifilmur - Tað skal annað og meiri til, enn at vera løgreglumaður fyri at halda skil á smábørnum. - Óhóskandi fyri smábørn, **29.** ***(20.30)***
- Boiler Room – amerikanskur spenningsfilmur - Er lønin tú fær ørandi góð, ruggar neyvan alt rætt. - Óhóskandi fyri smábørn, **29.** ***(23.10)***
- Rosewood – am. aut. filmur frá 1997 - Filmur um søguliga hending, sum fekk ræðuligar avleiðingar. - Óhóskandi fyri smábørn, **30.** ***(21.35)***
- Flawless – am. filmur við Robert De Niro - Um hvussu vaktarmaðurin misti heilsuna og noyddist at leggja fordómarnar frá sær. - Óhóskandi fyri børn, **02.** ***(22.10)***

**3+**
- Úlvahundurin , **30.** ***(10:10)***

**Canal+**
- Alone, **04.** ***(19:00)***
- Dragonfly, **29.** ***(19:00)*** **30.** ***(9:05)***
- Happy Accidents, **28.** ***(4:10)***
- Hysterical Blindness, **02.** ***(19:00)*** **04.** ***(13:55)***
- Lívið í átta pørtum, **28.** ***(19:00)***
- Surviving Picasso, **01.** ***(20:00)*** **02.** ***(10:30)*** **04.** ***(23:05)***

**Canal+Gul**
- Dragonfly, **01.** ***(10:35)*** **03.** ***(20:00)***
- Hart's War, **28.** ***(2:30)***
- Lummapína, **28.** ***(22:25)***
- Sade, **28.** ***(10:10)***
- Star Wars: Episode II - Álop klónanna, **28.** ***(0:05)***
- Surviving Picasso, **03.** ***(6:00)***

**DR 1**
- Beck - Lýsingarmaðurin, **04.** ***(21:00)***
- Harlequin: Ein óslípaður gimsteinur, **01.** ***(21:00)***
- Molly, **28.** ***(22:45)***
- Poeten og Lillemor, **29.** ***(19:40)***
- The Spring, **28.** ***(22:55)***
- Wexford: Tá skaðin er hendur, **29.** ***(21:15)***

**DR 2**
- Eitt heilt vanligt lív, **04.** ***(22:30)***
- Misery Harbour, **01.** ***(19:00)***

**TCM**
- Arturos Island, **28.** ***(2:05)***

**TV 2 zulu**
- Indiana Jones og tann reyði barónurin, **30.** ***(15:15)***
- Lifebreath, **29.** ***(0:15)***
- Muhammad Ali - heimsins besti boksari, **28.** ***(19:00)***

**TV 3**
- Eina mammu til jól, **03.** ***(21:50)***

**TV-1000**
- Jólamaður søkist, **29.** ***(15:00)*** **02.** ***(13:30)***
- Mothman - boðberi myrkursins, **30.** ***(19:00)*** **02.** ***(17:00)***
- Panic Room, **29.** ***(19:00)*** **03.** ***(21:00)***
- The Badge, **04.** ***(19:00)***

**TVDanmark1**
- Áðrenn Deadlinie, **03.** ***(20:00)***
- Fimm flatar, **03.** ***(0:10)***
- Forgotten Silver, **30.** ***(1:25)***
- Gylti drekin, **01.** ***(0:20)***
- Stóri bardagin, **02.** ***(0:35)***
- SubUrbia, **30.** ***(21:05)***
- Tey livandi deyðu venda aftur 2, **28.** ***(23:35)***
- The Force, **01.** ***(20:00)***
- The Love Letter, **28.** ***(20:00)***

**TVDanmark2**
- Chicago Cab, **30.** ***(2:15)***
- Hundalív, **29.** ***(19:55)***

**Fríggjadag 28. kl. 19.00**



### Kull the Conqueror
Barbárurin Kull verður krýndur kongur eftir at hann hevur dripið fyrrverandi kongin í kríggi. Men arvingin hjá dripna konginum roynir at taka krúnuna aftur. Gamla kellingadrotningin, Akivasha, hjálpir arvinganum. Men ætlan teirra gongur ikki júst sum ætlað...

**Fríggjadag 28. kl. 19.00**



### Lívið í átta pettum
J ætlar at vinna HM í Nintendo í Los Angeles. Hendan kappingin er einans eitt døgn eftir jødiska páskadøgverðan og hann vil so gjarna vera við til bæði páskadøgverðan og Nintendo kappingina. Um ikki hann megnar at koma til døgverðan, so er tað liðugt millum hann og unnustuna og eisini familjuna. Men fer tað at ganga?

**Fríggjadag 28. kl. 22.00**



### Go´ røv & go´ weekend
Við Adam og tí nú eitt sindur vaksnu bamsuni Svupper, sum í 70´unum gjørdist kendur í barnasjónvarpinum á DR. Eisini er dokumentarrøðin "Rockerne" ein partur av hesi skemti-ungdómssending. "Rockerne" gevir hyggjaranum innlit í gerandisdagin hjá limunum í danska rokkaraklubbanum "Svinene".

**Fríggjadag 28. kl. 23.55**



### American Psycho
Um unga Patrick Bateman, sum skiftir ham, tá náttin kemur. Patrick Bateman er ein ungur, vakur, gløggur og ríkur juppiari í áttatiárunum, púra ørur eftir merkjavørum. Um dagin arbeiðir hann í Wall Street, men um náttina broytist tann múgvandi ungi maðurin til ein sálarsjúkan hópdrápsmann. Ella er hetta kanska bara gykl...

**Leygardag 29. kl. 18.10**



### Bláa gongustjørnan
Farvatn, ið er langt frá landi, kann samanberast við eina oyðimørk. Her liva bara tey sterkastu og skjótastu av havsins djórum. At yvirliva úti á fjarlagdum farvatni er sera trupult, avgerandi er at vita, hvar ein skal leita eftir føði og so skal mann kunna røra seg uttan at brúka ov nógva orku.

**Leygardag 29. kl. 19.00**



### Behind the Music: Aerosmith
Teir í Aerosmith høvdu ein langan og tungan túr niðan á toppin á rokk ´n´ roll fjallið. Í teirra 30 ára yrkisleið sum tónleikarabólkur, hava teir í bólkinum frá Boston havt viðgang og mótgang. Men tó, eftir fleiri ættarlið hava teir vakt áhugan hjá fleiri áhoyrarum, ferð aftaná ferð.

**Leygardag 29. kl. 19.50**



### Teir tríggir musketerarnir
Í 1625 er tann ungi D´Artagnan á veg til París, her skal hann gerast musketerur í lívverjuherliðnum hjá konginum. Men einans tríggir musketerar eru trúgvir móti konginum. Kardinalurin Richelieu hevur upployst herliðið. D´Artagnan fer í partin við konginum og hinum trimum.

**Leygardag 29. kl. 20.00**



### SATSA 3. sending
Spurnarkapping, har tað ræður um at duga at satsa. Vit fara aftur at SATSA og mannagongdin í sendingunum er broytt soleiðis, at nú eru bert tvey umfør og ein finala. Vinnarin fer víðari og hevur møguleikan at halda fram viku eftir viku. Vertur er Heri Jacobsen

**Sunnudag 30. kl. 15.15**



### Champions League Beinleiðis (m): Kolding - Ljubljana
Sætta og síðsta umfar í Champions League í bólki C. Her fær hondbólts-felagið KIF Kolding vitjan av slo-vensku meistarunum Prule 67 Ljubl-jana. Hetta liðið stóð seg sera væl í seinastu kapping, har liðið kom í semifinaluna, men bleiv steðga av vinnarunum av kappingini tá, Montpellier HB. Frásøgumenn eru Per Skaarup og Holger Rasmussen.

**Sunnudag 30. kl. 16.00**



### Premier League Beinleiðis: Chelsea - Manchester United
Beinleiðis av Stamford Bridge. Aftaná eigaraskifti í felagnum Chelsea, við Roman Abramovich, eru fleiri nýggir og dýrir leikarar komnir til. Men Manchester United og Fergie ætla uttan iva at spæla sítt spæl og vinna dystin.

**Sunnudag 30. kl. 19.40**



### At klappa við einari hond
Kona tann vælhavandi Erik Svensson doyr eftir eina langa sjúkralegu. Hann avger at broyta lív sítt. Nú er hann so á veg til Spania við unnustu síni, sum einaferð skal arva ríkidømi hansara. Men ein sakførari kemur við boðunum at hann hevur eina vaksna døttir, tískil hevur hann ein tvingsislsarving. Sera ymisk menniskju møtast.

**Sunnudag 30. kl. 20.00**



### Ronin
"Ronin" merkir á japanskum máli ein harraleysur samurai ella stríðsmenn. Sam, ein fyrrverandi loyniligur agentur fyri ein stat, er á odda fyri einum bólki av fyrrverandi agentum og snigdrápsmonnum, ið hava skipað seg. Teir liva av at gera uppgávur fyri meiri og minnið ólógligar kundar.

**Mánadag 1. kl. 18.00**



### Jól á posthúsinum 1
Boði Post hevur fingið nógvan post, sum má skiljast. Og so er hann so sera spentur at vita, um nakrir grønir brævbjálvar frá børnunum eru komnir. Tíbetur koma Rógvi og Halla at hjálpa honum og um hyggjarin fær hug at hjálpa, kann hann ringja 322666. Men so er tað eitt annað bræv, sum hann bíðar eftir, og sum hevur nógv at týða fyri hann.

**Mánadag 1. kl. 21.00**



### Death by Magic
Óndar kreftir ætla at hertaka Jørðina. Gandakallurin Michael Devane er síðsta vónin hjá mannaættini. Síðan tíðarinnar morgun hevur kríggj valdað millum tað ónda og tað góða. Nú má ein nýggjur gandakallur veljast til at berjast móti tí ónda. Men Devane er alt annað enn áhugaður í at berjast.

**Mánadag 1. kl. 21.25**



### Blue Streak
Miles Logan verður svikin av sínum felaga og verður koyrdur í geglið eftir eitt gimsteinarán. Men áðrenn hetta hendi, megnaði Miles at goyma fongin. Nú at hann hevur sitið sína tíð, fer aftur til goymistaðið. Men har goymistaðið var fyrr, er nú ein løgreglustøð!

**Mánadag 1. kl. 21.55**



### Kicker
Fótbóltur úr Premier League og Bundesliga. Fótbóltssendingin, Kicker, vísir hyggjarunum hvønn mánadag mál og hæddarpunkt úr vikuskiftisdystunum í bestu ensku deildini og týsku Bundsliga. Tað er her Thierry Henry, Ruud Van Nistelrooy, Michael Ballack & Co. gera um seg.

**Týsdag 2. kl. 18.30**



### Simpsons
Lisa byrjar sína egnu barnaansing og sjálvt um hon er so ung, so er hon væl dámd. Ja, so væl dámd at Homer og Marge biðja Lisu ansa eftir systkjum sínum, tá tey bæði skulu í býin at keypa inn. Hesum dámar Bart einki, hann setir sær fyri at gera uppgávuna sera trupla fyri Lisu.

**Týsdag 2. kl. 22.10**



### Flawless
Um hvussu ein vaktarmaður misti heilsuna og noyddist at leggja fordómarnar frá sær. Brotsmenn fremja yvirgang í húsunum og Walt kemur til hjálpar. Men hann fær ein hjartatilburð, sum lammar bæði bein og talugávur. Grannin roynir at hjálpa, men hann er transvestittur.

**Týsdag 2. kl. 22.25**



### Í skotmálanum
Secret Service agenturin Frank Horrigan, sum einaferð var lívverjin hjá m.a. Kennedy forsetanum, fæst nú við aðrar uppgávur. Frank og felagi hansara, Al, gerast greiðir yvir at ein sera álvarslig atgerð er ávegis, tá teir tann eina dagin eru úti á eini vanligari rutinu uppgávu.

**Týsdag 2. kl. 20.00**



### Oliver´s Twist (26)
Áðrenn Jamie og Jools fara heim til teirra familjur at halda jólaaftan, ger hann ein stórslignan jóladøgverða til starvsfelagar sínar. Jamie Oliver er helst kendur um allan heimin og ein av hansara kokkabókum er ikki heilt ókend undir jólatrænum.

**Mikudag 3. kl. 18.30**



### Frasier
Madeleine og Frasier varnast at fyrrverandi kona Frasier, Lilith og vinur hennara eisini hava ætlanir um eina romantiska ferð til sama staðið, sum tey bæði. Øvundsjúka og annað stinga seg upp. Tað gongur rættiliga galið, tá Lilith sigur honum at hon skal giftast við Brian.

**Mikudag 3. kl. 20.50**



### Wise Guys
Vinirnir Harry Valentini (Danny DeVito) og Moe Dickstein (Joe Piscopo) eru báðir í starvi hjá tí samvitskuleysa gangstaranum Anthony Castelo. Teir hava eitt sera keðiligt arbeiði og kenna seg ikki tryggar í hesi skitnu vinnuni. Teir vóna at teir ein dagin sleppa úr ólógliga virkseminum. So, ein dagin fáa teir møguleikan.

**Mikudag 3. kl. 21.50**



### Eina mammu til jóla
Jessie misti mammu sína, tá hon einans var 3 ára gomul. Nú er hon ein ung genta og enn hon saknar mammu sína illa. Tá hon ein dagin keypir inn í einum handilssentri, vinnir hon eitt jólaynski. Hon ynskir sær eina mammu, ið kann keypa jólagávur saman við sær. Ynski hennara gongur út...

**Mikudag 3. kl. 22.45**



### The Tonight Show við Jay Leno
Í fótsporum Steve Allens, Jack Paars og Johnny Carsons fylgir Jay Leno, sum ein undirhaldandi late-night vertur. Í mei 2002 kundi hann hátíðarhalda 10 ára dagin fyri hansara prátsendingar við kendum gestum. Gestir eru: Madonna og tónleikaurin kemur Nelly Furtado.

**Hósdag 4. kl. 18.00**



### Simpsons
Bart skikkar sær illa. Hann keypir sær, við einum følskum kreditkorti, eina rúgvu av sera kostnaðarmiklum tingum, m.a. yndis hund hansara Laddie. Men tá inkasso kemur eftir teimum ólógliga keyptu tingunum, gevir Bart teimum hundin sum familjan eigur, Santa´s Little Helper.

**Hósdag 4. kl. 19.00**



### Alone
Heimurin hjá Alex er fyltur við ræðslu. Hann hoyrir røddir frá fortíðini, sum pína hann. Nú leitar hann eftir gentuni, ið kann minka um hansara pínu. Alex letur spor liggja eftir sær av líkum - ein morðgáta, sum løgreglukvinnan Hannah roynir at loysa.

**Hósdag 4. kl. 19.00**



### Tunglyndi 2:5
Nógvir ungdómar líða av tunglyndi, men ofta ganga nógv ár, áðrenn sjúkan verður staðfest. Um tunglyndi í ungdómsárunum ikki verður viðgjørt, kann tað fáa álvarsligar fyljgur. Tess fyrr tunglyndi verður uppdagað, tess betur møguleikar eru fyri at lekja sjúklingin.

**Hósdag 4. kl. 20.00**



### Batman vendir aftur
Hóast at The Joker bleiv beindur av vegnum, eru óndar magtir uppá spæl í Gotham City. Tveir av hesum eru Oswald Cobblepot og fíggjarprinsurin Max Shreck. Teir ætla at Cobblepot skal gerast borgarstjóri. Batman missir sítt góða umdømi í býnum, men hann fær hjálp frá fyrrverandi sekriterinum hjá Shreck, Selina ella Catwoman.

**Leygardagur 29. kl. 17.00**



### Sjómanssendiningin, Vitin
Vit runda sending nr. 200 við stjóranum á Strandfaraskipum Landsins.

Stórreiðarin bæði á sjógv og landið kemur í útvarpstovuna. Hann er ungur, men hevur nógvar royndir sum hava garva hann til uppgávuna.

Kristian Davidsen er verkfrøðingur og undirvísti á fróðskaparsetrinum áðrenn hann fór at starvast hjá Erickson sum deildarleiðari.

Hann skammast ikki við sín frelsara, og vitnar um hvønn týdning Guðstrúgvin hevur í hansara daglia lívið.

Símin Hansen leggur sendingina til rættis.

**leygardagur 29. kl. 19.05**

### Hans Hedtoft - tað danska Titanic.
Tann 7. januar í 1959 fór nýggja skipið hjá Kongaliga Grønlendska Handlinum „Hans Hedtoft" á sína fyrstu ferð til Grønlands. Ferðin gekk væl, men tá skipið tríggjar vikur seinni var á veg aftur til Danmarkar, kom tað í illveður á Hvarvinum. 30. januar sendi skipið út neyðarkall, og nakrar tímar seinni sakk tað. Við „Hans Hedtoft" vóru 55 ferðafólk umframt manningina, sum taldi 40. Eingin varð bjargaður. Hendan frásøgumyndin, sum Árni Joensen hevur skrivað um vanlukkuna, er eftir bók, sum Thomas Rockwell hevur skrivað, og sum kom út í fjør.

**Sunnudagur 30.kl. 13.10**

### Fransar undir Íslandi
Nýggj sending verður nú á skránni hjá útvarpinum sunnudag klokkan 13.10. Hon eitur „Fransar undir Íslandi". Fransmenn fóru undir Ísland at royna fyri umleið 500 árum síðani, og summi ár vóru meiri enn 200 fronsk skip á íslandsmiðunum. Elin Pálmadóttir hevur skrivað bók um franska fiskiskapin, og frásøgnin er úr hesari bókini. Árni Joensen hevur føroyskað.

**sunnudagur 30.kl. 14.15**

### Framvið ánni
Í seinnu sendingini við Jógvani Ingvard Olsen á Toftum verður prátað nógv um hólmarnar á Toftavatni. Eisini verður farið í eina av gomlu skotgrøvunum, sum bretsku hermenninir gjørdu undir seinna veraldarbardaga.

**VARPIÐ**

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

## Ítróttur

**3**

**Leygardagin kl. 15.00**
SAS-ligan
**Sunnudagin kl. 16.00**
SAS-ligan

**CANAL+**

**Leygardagin kl. 12.25**
Premier League: Wolverhampton-Newcastle
**Leygardagin kl. 14.45**
Premier League leygardagur
**Sunnudagin kl. 16.00**
Premier League: Chelsea-Manchester Utd.
**Sunnudagin kl. 0.00**
NHL: New York Rangers-Toronto
**Mikudagin kl. 0.30**
NHL: Detroit-Anaheim

**CANAL+**

**Leygardagin kl. 19.25**
Seria A
**Sunnudagin kl. 19.25**
Seria A

**Sunnudagin kl. 15.15**
Hondbóltur: Kolding-IF-Prule 67, menn

**Sunnudagin kl. 14.45**
V5-Travet

**EUROSPORT**

WC Stórsnirr úr Park City, USA
WC Snirr úr Park Citu, USA
WC Strok úr Lake Lousie, Kanada
WC Super G úr Lake Louise, Kanada
WC Bobsleðu úr Lake Placid, USA
WC Langrenn úr Kuusamo, Finnlandi
WC Skíðlop úr Kuusamo, Finnlandi
WC Skíðskjótin úr Kontiolahti, Finnlandi
Snooker úr York, Onglandi
Fótbóltur lutakast til EM 2004
Badminton úr Saarbrücken, Týsklandi

**TV2 ZULU**

**Fríggjadagin kl. 21.00**
Nevaleikur CBC úr Roskildehøllunum
**Leygardagin kl. 16.55**
Hondbóltur: Veszprém-Skjern, menn
**Sunnudagin kl. 12.55**
Íshockey: AaB-Rungsted
**Sunnudagin kl. 21.00**
NFL
**Mánadagin kl. 11.05**
NFL
**Týsdagin kl. 15.55**
HM-Hondbóltur
**Týsdagin kl. 17.55**
HM-Hondbóltur
**Mikudagin kl. 15.55**
HM-Hondbóltur
**Mikudagin kl. 18.10**
HM-Hondbóltur
**Hósdagin kl. 15.55**
HM-Hondbóltur
**Hósdagin kl. 17.55**
HM-Hondbóltur

**TvDanmark 1**

**Leygardagin kl. 13.55**
Bundesligan: Bochum-Stuttgart
**Leygardagin kl. 18.25**
La Primera
**Leygardagin kl. 20.25**
La Primera
**Leygardagin kl. 0.35**
NBA: Minnesota-Dallas

Tennis: Davis Cup
Fótbóltur Hollendska heiðursdeildin
Fótbóltur Enska Liga Cup
Kurvabóltur Euroleague
Golf Omega Hong Kong Open